# ÁNIR

Fólkatal: 63 (2017). Klaksvíkar Kommuna. / *Population: 63 (2017). Municipality of Klaksvík.*






Her ert tú
*You are here*

Neyð og hjálp
*Emergency call*
**112**

Visit Norðoy

Tel. + 298 456939

Skanna hesa kotu, og kunna teg nærri um ferðamøguleikar í Norðoyggjum.

*Scan this code, and get more information about travelling in the Northern Islands.*



## Ver ein hjálpirót

- Lat einki órudd liggja eftir tær – rudda heldur upp.
- Stuðla bygdunum – keyp staðbundnar vørur.

## Be a helping root

*Hjálpirót is the Faroese word for rose root (Rhodiola rosea), a flourishing plant traditionally used for medicine. Hjálpirót means „helping root", and you can be one by following these simple steps.*

- *Please do not litter – but feel free to pick up litter on your way.*
- *Support the local community – buy local goods.*

*

## Tá ið tú fert til fjals

- Best er at hava staðkendan ferðaleiðara við á túrum í fjøllunum – nærri kunning fæst á Norðoya Kunningarstovu.
- Boða onkrum frá, um tú fert til fjals uttan ferðaleiðara.
- Fylg rásum og varðum, og minst til at lata hagaportrini aftur eftir tær.
- Gev seyði, fugli og gróðuri frið.

## Hiking advice

- *We recommend that you bring a local guide with you on mountain hikes in the Northern Islands. Please contact Visit Norðoy for further information about guided hiking trips.*
- *If you do go on your own, please let your host know where you are going.*
- *Follow the paths and cairns, and close the outfield gates behind you.*
- *Avoid disturbing sheep, birds and plants.*

Nærri kunning um trygd á fjalltúrum fæst við at skanna hesa kotu.

*For more information about safe hiking in the Faroe Islands, please scan this code.*

## FO

Ánir er ein bygd, sum sigur frá framburði – bæði í landbúnaðarsamfelagnum og innan nútíðar vinnulív. Veðurgóð havn og rík gróðarlíkindini drógu framfýsin niðursetufólk at sær í 1840, og í nýggjari tíð er bygdin vorðin karmur um eina altjóða havn, sum stendur fyri stórari virðisøking í Norðoyggjum.

Ánir er nevnt sum staðarnavn í sambandi við seyðastuldur í 1657, men tað var ikki fyrr enn í 1840, at hjúnini Johannes Eriksen og Margrethe Joensdatter sum tey fyrstu búsettust her. Hjúnini fluttu av Strond, ið liggur beint norðan fyri Ánirnar. Johannes Eriksen varð føddur og vaks upp á Strond, sum nú er avfólkað. Í fólkateljing frá 1845 sæst, at foreldur hansara eisini eru flutt til Ánirnar. Hóast tað bert er góður hálvur annar kilometur ímillum Strond og Ánir, so er stórur munur á veðurlagnum. Tað er óvanliga vindhart á Strond, har útsynningurin rakar hart, tá ið hann sum eitt óløgi kemur sunnan úr Klaksvík. Ánir er harafturímóti eitt framúr veðurgott pláss, og tað eru ikki bert útflytararnir av Strond, sum hava notið gott av tí. Ánir er nú ein altjóða havn, har útlendsk og føroysk fiskiskip, farmaskip og stór ferðamannaskip leggja at – eisini í ringum veðri, tá ið illa ber til at leggja at aðrastaðni.

### Niðursetubygin Ánir

Niðurseturbygin Ánir (1) er norðan fyri Norðhavnina og framvegis ein býlingur fyri seg. Gáa um yvirvaksnu trøini, tí tey vitna um veðurgóðu líkindini á hesum stað. Fyrsta húsið í Ánunum varð bygt í Ryggi, og hús standa framvegis á hesari grund (2). Tað sigst at Johannes Eriksen hevði eina heldur undranarverda framferð, tá ið hann skuldi velja sær grund at byggja á. Søgn er, at hann gekk niðan á Svøð, haðani hann skumpaði ein stein útav. Húsini skuldu standa, har sum steinurin steðgaði, og soleiðis komu tey at standa í Ryggi.

### Bakkaneystið

Norðhavnin fyllir nógv í landslagnum í Ánunum. Stórur partur av fjøruni, gomul neyst og nøkur hús eru horvin so hvørt sum havnin er útbygd, og landvegurin er breiðkaður. Ein forvitnislig leivd er tó eftir frá tíðini, tá ið Ánirnar var partur av einum siðbundnum bóndasamfelag. Bakkaneyst (3), ið stendur tætt norðan fyri Norðhavnina, er á leið 130 ára gamalt, og ímillum tey heilt fáu av sínum slag, sum stendur javnfjart við sjóvarmálan.

### Norðhavnin

Norðhavnin (4) verður av mongum mett sum tryggasta og best varda havn í Føroyum. Í 1990-unum var tørvurin á víðkaðari atløgubryggju so stórur, at eitt samt Klaksvíkar býráð tók undir við at byggja atløgubryggju í Ánunum. Atløgubryggjan hevur fingið navnið Norðhavnin, og hon er støðugt útbygd. Í 2009 vóru 117 metrar lagdir aftur at bryggjuni, sum nú er 317 metrar long og 12 metrar djúp. Eitt av fremstu reiðaravirkjunum í Føroyum hevur høvuðsstøð í Norðhavnini, og hon er hartil karmur um týðandi farmaflutning.

### Edmundstrøð

Edmundstrøð (5) varð bygd í 2009, og nýggi býlininginum førdi til eina brádliga fleirfaldan av fólkatalinum í Ánunum, sum leyp frá 16 upp í 55 eftir 7 árum. Arkitektteknaðu húsini eru ymisk til støddar og hava gott útsýnið yvir rokanina í Norðhavnini, Kunoyarnes og fjørðin. Eini eldri niðursetuhús standa framvegis við Edmundstrøð, sum upprunaliga bar heitið Illa Gil. Hetta staðarnavn stavar frá einum illgongdum gili, sum einaferð var á hesum stað, men sum sjálvsagt ikki longur er til ampa hjá teimum, ið ferðast ímillum Ánir og Klaksvík í bili eftir asfalteraðum vegi.

## EN

*Ánir is a village that shows the history of progress – both within the agricultural society and modern business. A well-sheltered harbour and fertile soil attracted enterprising settlers in 1840, and in newer times the village has become the setting of an international port that accounts for the significant economic boost in the Northern Islands.*

*Ánir, as a place name, was mentioned in connection with sheep rustling in 1657, but it was not until 1840 that the couple Johannes Eriksen and Margrethe Joensdatter were the first people to settle here. The couple moved from Strond, a village that lies to the north of Ánir. Johannes Eriksen was born and raised in the now depopulated Strond. The census of 1845 shows that his parents also moved to Ánir. Even though there are only about 1.5 kilometres between Strond and Ánir, the weather conditions are very different. It is unusually windy in Strond, where the south-west wind hits hard when it blows like a hurricane south from Klaksvík. Ánir, on the other hand, is a very well-sheltered place, and it is not only the emigrants from Strond that have benefitted from this. Ánir is now an international harbour where foreign and Faroese fishing vessels, cargo ships and ocean liners dock – also in bad weather when it is hard to dock in other places.*

### The Settlement Ánir

*The settlement Ánir (1) is to the north of Norðhavn and is still a district of its own. Notice the well-grown trees; they bear witness to the excellent weather conditions in this place. The first house in Ánir was built in í Ryggi, and there is still a house on the site (2). It is said that Johannes Eriksen had a somewhat peculiar way of choosing the site on which to build his house. Legend has it that he walked up to Svøð and pushed a rock off the hill. The house stands where the rock stopped rolling, and that was how it came to be placed in í Ryggi.*

### The Bakka Boathouse

*The Norðhavn Port takes up a lot of space in the landscape of Ánir. Gradually, a large part of the foreshore, old boat houses and some houses have disappeared as the harbour has been extended and the main road widened. One interesting old house, from when Ánir was a part of a traditional peasant society, still stands. The Bakka boathouse (3) that stands to the north, close to Norðhavn Port, is about 130 years old and is among the few of its kind that stands parallel to the beach.*

### The Norðhavn Port

*The Norðhavn Port (4) is deemed to be one of the safest and best-protected ports in the Faroe Islands. In the 1990s the need for an extended landing quay was so great that the city council of Klaksvík agreed to support the construction of a landing quay in Ánir. The landing quay was named Norðhavn, and it is being continuously extended. In 2009, 117 metres were added to the quay, which is now 317 metres long and 12 metres deep. One of the leading shipping companies in the Faroe Islands has its headquarters in the Norðhavn Port, and it is the site of major freight transport.*

### Edmundstrøð

*Edmundstrøð (5) was built in 2009, and the new district led to a sudden influx of inhabitants in Ánir, and the population increased from a mere 16 to 55 in 7 years. The architecturally designed houses are different in size and have a great view of the bustle in Norðhavn, Kunoyarnes and the fjord. Edmundstrøð used to be called Illa Gil. The name comes from a brook that once streamed here that was rather hard to cross. Of course, the brook would no longer present any difficulty for those travelling by car on the road that now runs between Ánir and Klaksvík.*

## VIT VIÐMÆLA

### Garðurin úr grindaskøltum

Garðurin framman fyri húsini í Ryggi (2) er eitt hugvekjandi dømi um, hvussu stóran ómak føroyingar hava gjørt sær fyri at einki skuldi fara til spillis. Tvær bræðingarstøðir vóru heima við Grótrætt í Ánunum fram til miðskeiðis í 1950-unum, og lýsið varð smeltað úr spikinum á grindahvali. Maðurin, ið einaferð búði í Ryggi, arbeiddi á aðrari bræðingarstøðini, og hann gjørdi ikki mætari enn at laga garð burtur úr grindaskøltunum, sum lógu eftir. Grindaskøltarnir eru fúnaðir við tíðini, men handan mosa og gras síggjast framvegis hvítir skøltar, sum vórðu nýttir í hesum heldur óvanliga bygningsverkið.

## LOCAL'S CHOICE

### The Wall of Pilot Whale Skulls

*The wall in front of the house in í Ryggi (2) is a fascinating example of how much care the Faroese people have taken to prevent unnecessary waste. There were two melting stations by Grótrætt in Ánir up to the middle of the 1950s, where whale oil was melted from pilot whale blubber. The man who once lived in í Ryggi worked in one of the melting stations, and he made a wall out of the discarded pilot whale skulls. The pilot whale skulls have crumbled over time, but behind moss and grass the white skulls, which were used to make this – rather unusual – structure, are still visible.*